# Bókarúgva frá Bókadeildini

**Børn og ung kunnu gleða seg til fimm nýggjar bøkur, har enn ein søga úr Narnia, ein um Detektivstovuna hjá Lassa og Mariu og ein við ljóði í eru millum søgurnar**




BØKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

### Mææ! Mææ! -Ljóð og hyggabø

Ein vøkur, litrík myndabók til tey yngstu. Í bókini eru klaffar og fimm djóraljóð goyma seg undir teimum. Bókin hevur battarí, ið kann skiftast.

Dawn Sirett hevur skrivað og Marna Jacobsen hevur týtt til føroyskt.

### Á sum Panama er vakurt.

Tá ið tú hevur ein vin, so er einki at óttast fyri! Tann lítla bjørnin og tann lítli tikarin eru bestu vinir. Og tey ræðast ikki nakað, tí at tey eru so ómetaliga sterk, sterk sum ein bjørn og sterkur sum ein tikari. Í húsinum við ánna hava tey tað gott. Men ein dagin fara tey avstað at leita eftir Panama, dreymalandi sínum. Á leiðini uppliva tey mangt spennandi. Men hvar er Panama? Revurin, kúgvin og músin – tey hava ongantíð hoyrt um Panama, bara krákan hjálpir teimum fram á leið. At enda finna tey tað, tey leita eftir.

Bókin hevur fingið Deutsche Jugendlitteraturpreis.

Janosch hevur skrivað og myndprýtt bókina. Anja Tell hevur týtt bókina. Bókin er 52 blaðsíður og er vælegnað til tey 3-6 ára gomlu.

### Skúlagátan

Í Válavík floymir tað yvir við følskum pengaseðlum. Sporini føra Lassa og Maiu til teirra egna skúla. Men fyri at avdúka tann seka mugu tey sita á varðhaldi um náttina og duga væl við amboðunum, tá ið fingramerki skulu savnast inn.

Ein spennandi og lættlisin detektivsøga við nógvum, stuttligum myndum.

Hetta er 9. detektivsøgan um Lassa og Maju. Bøkurnar eru sera vælumtóktar millum børnini.

Martin Widmark hevur skrivað bókina. Helena Willis hevur myndprýtt, og Sámal K. Jacobsen hevur týtt til føroyskt.

Bókin er 90 síður og hóskar væl til tey 7-10 ára gomlu.

### Silvur stólurin – Søgur úr Narnia nr. 6

Ein kongssonur er tikin fangi – eitt land er í stórum vanda.

Narnia – har risar skapa ruðuleika...har óndskapur rúnarbindur øll – har alt kann henda.

Gjøgnum ótaldar vandar og djúpar myrkar holur undir jørð eru nøkur vinfólk send at bjarga einum kongssoni, ið er tikin fangi. Men á ferðini til undirheimin koma tey at standa andlit til andlits við óndskap, ið er vakrari og deyðiligari enn tey nakrantíð høvdu dugað at ímynda sær.

C.s. Lewis hevur skrivað bókina. Pauline Baynes hevur myndprýtt, og Theodor Hansen hevur týtt bókina til føroyskt.

Bókin er 203 blaðsíður og er vælegnað til tey 11-13 ára gomlu.

### Flogmaður

Hjá Conor Broekhart er einasti útvegurin... uppeftir.

Conor Broekhart var føddur til at flúgva. Ella rættari sagt, so var hann føddur á flogi. Tað kann tí valla undra, at hann gjørdist tann, hann gjørdist.

Eina myrka nátt á Stóru Saltoy var lív hansara lagt í oyði og eydnan tikin frá honum av eini óndsinnaðari og vælskipaðari svikagerð. Fyri at bjarga familju sínari og at rætta ein ræðuligan skeivleika noyðist Conor at verða fyrstur at røkka dreyminum at flúgva.

Eoin Colfer hevur skrivað bókina. Hetta er sami høvundur, sum hevur skrivað vælumtóktu røðina um Artemis Fowl. Bergur Rasmussen týddi til føroyskt.

Bókin er 392 blaðsíður og er ætlað teim ungu.

---




*Tær 31 klummurnar, sum Armgarð Arge skrivaði til morgunsendingina hjá Kringvarpinum síðsta vetur, eru nú komnar út í bók*

## Klummurnar hjá Armgarð út í bók

Øll spurdu, hvør mundi hava skrivað, tá útvarpið hjá Kringvarpinum síðsta vetur hvønn fríggjamorgun hevði eina sera vælskrivaða klummu sum part av morgunsendingini.

Ikki fyrr enn seinasta klumman varð lisin tann tann 29. mai avdúkaði útvarpið, at tað var Armgarð Arge, gudfrøðingur, sum starvast í Kringvarpinum, sum skrivað hevði.

Nú eru allar tær 31 stuttligu klummurnar komnar út í bók – og til hvørja klummu hevur Óli P, skemtiteknari hjá Sosialinum, gjørt stuttliga tekning.

Tað er Føroyaprent, sum hevur staðið fyri prentingini, og tað er felagið Saluto, sum gevur bókina út.

Bókin kom í bókabúðirnar í gjár.




*Mongu gittu – men fá gittu rætt, at tað var Armgarð Arge, sum skrivað hevði klummurnar hjá Kringvarpinum síðsta vetur. Eisini Sosialurin undraðist – og tað gjørdist forsíðusøgan hendan fríggjadagin 29. mai, tá høvundurin varð avdúkaður*